## John trívist sum venjari

John Petersen er nú hjálparvenjari á fótbóltslandsliðnum, eftir at hann í fleiri ár var ein grundstuðul á vøllinum.

- Fyrstu ferðina var tað løgið at verða á landsliðnum sum venjari, men eg havi vant meg við mín nýggja leiklut, sigur John Petersen.

- Hetta er ein sera spennandi uppgáva at fáa, og eg eri ikki minst spentur, nú fyrsti veruligi dysturin er fyri framman. Eg havi ikki havt nervar, síðani eg spældi á landsliðnum í 1995, men eg rokni við, at teir koma aftur áðrenn hendan dystin, sigur hann.




## Málmenninir eru báðir úr Klaksvík

Í nógv ár hava Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen verið fremstu málmenn í landinum. Teir hava eisini gjøgnum meginpartin av 90'unum og fram til í dag verið landsliðsmálmenn. Aðrir málmenn hava verið inni í myndini av og á, men eingin ivi hevur verið um, at teir hava átt landsliðsplássini í meira enn 10 ár.

Nú er Jens Martin Knudsen givin sum málmaður á landsliðnum, og til dystin mikukvøldið eru tað tveir klaksvíkingar, sum eru málmenn. Jákup Mikkelsen, sum spælir fyri B36, er trygt fyrstaval til málmansplássið, og nú er Meinhardt Joensen úr KÍ fyrstu ferð við sum eykamálmaður.

# Óli skal leiða teir ungu

**- Eg kenni mína ábyrgd sum liðformaður og royndur spælari á landsliðnum, men teir ungu duga eisini, og fleiri av teimum hava longu fingið fitt av royndum, sigur 34 ára gamli Óli Johannesen, sum nú fer undir nýggja EM-undankapping sum liðformaður á landsliðnum**

**FØROYAR-GEORGIA**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*- Vit skulu spæla eitt nýtt lið saman, og tað tekur altíð nakað av tí. Vit fara ikki á vøllin fyri at tapa nakran dyst, men fólk skulu kanska hava eitt sindur av toli fyrstu tíðina og ikki seta ov stór krøv til liðið, sigur Óli Johannesen. Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann hevur spælt 76 ferðir á landsliðnum, hann hevur tamt spælarar sum Henry, Ballack og Gudjohnsen, og hann hevur sanniliga eisini gjørt eitt mál.

Óli Johannesen er tann føroyski fótbóltsspælarin, ið hevur spælt flestar landsdystir, og hóast hann nú er blivin 34 ára gamal, tekur hann enn eitt tørn sum verjuspælari og liðformaður á landsliðnum.

Mikukvøldið byrjar nýggja EM-undankapping, og Óli skal leiða eitt nýtt lið til sína fyrstu veruligu uppgávu.

- Tað er líka spennandi at verða við nú, sum tað plagdi at vera, men tað er kanska spennandi á ein annan hátt, enn tað onkuntíð var, sigur Óli Johannesen.

- Eg kenni mína ábyrgd sum liðformaður og royndur spælari á landsliðnum. Vit hava fingið fleiri nýggjar spælarar á liðið, og tað er altíð spennandi at vita, hvussu teir nýggju fara at standa seg, sigur hann.

### Liðið skal spælast saman

Spælarar sum Janus Joensen, Kári Nielsen, Hans Pauli Samuelsen, Bergur Midjord, sum er skaddur hesaferð, Hanus Thorleifsson, Bárður Olsen og aðrir eru av álvara komnir inn í landsliðsmyndina, og fleiri av teimum kunnu vænta sær at fáa kjansin í hesari undankappingini.

- Vit skulu spæla eitt nýtt lið saman, og tað tekur altíð nakað av tí. Vit fara ikki á vøllin fyri at tapa nakran dyst, men fólk skulu kanska hava eitt sindur av toli fyrstu tíðina og ikki seta ov stór krøv til liðið, sigur Óli Johannesen.

- Eg kenni ikki eyka ábyrgd, tí eg havi flestar landsdystir, men eg ætli mær at halda fram við tí leikluti, sum eg havi havt. Teir ungu duga eisini, og fleiri av teimum hava longu fingið fitt av royndum bæði í sínum feløgum og á landsliðnum, sigur hann.




### Formulaliðið

*Ítróttar-Sosialurin mannar Formulaliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 19. umfari av Formuladeildini um vikuskiftið.*

## Janus er klárur at taka kjansin

**- Eg havi ongantíð áður havt so góðan møguleika at koma á landsliðið sum júst nú, og fái eg kjansin ímóti Georgia, ætli eg mær at taka hann, sigur Janus Joensen**

**FØROYAR-GEORGIA**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið skjótt framá hjá Janusi Joensen seinastu árini. Hann hevur vunnið sær pláss sum fastur maður á HB-liðnum, í ár er hann blivin liðformaður á liðnum, og mikukvøldið fær hann eftir øllum at døma kjansin sum vinstri bakkur á landsliðnum.

- Eg havi havt landsliðið sum eitt av mínum málum, og eg føli, at eg eri komin nærri málinum í ár. Eg var við ímóti Póllandi, og tað er ein góður møguleiki fyri, at eg sleppi at royna meg ímóti Georgia, sigur Janus Joensen.




*- Eg havi havt landsliðið sum eitt av mínum málum, og eg føli, at eg eri komin nærri málinum í ár, sigur Janus Joensen, sum eftir øllum at døma fær kjansin ímóti Georgia í annaðkvøld. Mynd: Álvur Haraldsen*

- Eg havi ongantíð áður havt so góðan møguleika at koma á landsliðið sum júst nú, og fái eg kjansin ímóti Georgia, ætli eg mær at taka hann, sigur hann.

Væntar trupla uppgávu

Um middagsleitið í dag vandi føroyska landsliðið á Svangaskarði, og tá fingu Janus og hinir spælararnir ivaleyst eina ábending um, hvussu Jógvan Martin Olsen ætlar at manna liðið til dystin í annaðkvøld.

- Eg rokni við einum truplum dysti ímóti Georgia. Eg havi áður roynt at spæla ímóti liðum úr Eystureuropa, og tey eru nakað av tí harðasta at spæla ímóti. Spælararnir hjá teimum eru tekniskt væl fyri, teir eru skjótir og sterkir, og so gevast teir ongantíð við at leypa á, sigur Janus Joensen.

- Men vit eru eisini væl fyrireikaðir til dystin, og vit fara at gera okkara besta fyri at fáa eitt gott úrslit, sigur hann.